**Samandráttur av fundarsamtykt hjá Hvalbiar Kommunu tann 29. mai 2012**

Møtt: Otto West, Trygvi Midjord, Martin í Nesi, Herdis Jensen

Rúni Thomsen og Niels J. Thomsen.

Niels Olaf Eyvindsson kundi ikki møta.

| | |
|---|---|
| **Mál 1:**<br>**Umsókn um stuðul til ráðstevnu um ung í Norðurlandahúsinum.** | Til 1:<br>Samtykt varð ikki at stuðla tiltakinum. |
| **Mál 2:**<br>**Umsókn um stuðul til mentanarligt átak í Sumba.** | Til 2:<br>Samtykt varð ikki at stuðla. |
| **Mál 3:**<br>**Umsókn um stuðul til útgávu av bókini "Eivindaródn".** | Til 3:<br>Samtykt varð ikki at stuðla útgávu av bókini. |
| **Mál 4:**<br>**Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Føroya Fuglafrøðifelag.** | Til 4:<br>Samtykt varð ikki at stuðla við tveimum at-kvøðum fyri og fýra ímóti. |
| **Mál 5:**<br>**Umsókn um peningaligan stuðul til námsferð til Barcelona.** | Til 5:<br>Samtykt varð at stuðla við kr. 500,- hvør, sum er tann upphædd, ið vanliga verður latin til næmingar, ið fara námsferð. |
| **Mál 6:**<br>**Umsókn um stuðul til bygging av skúlabygn-ingi í Nakuru.** | Til 6:<br>Samtykt varð ikki at stuðla hesari verkætlan. |
| **Mál 7:**<br>**Umsókn um stuðul til skeið fyri ovurfeit børn.** | Til 7:<br>Samtykt varð ikki at stuðla hesum. Tó so, at skúlin kann leigast fyri ein bíligan kostnað. |
| **Mál 8:**<br>**Tilboð um venjing av eldri borgarum 65+ í Hvalba.** | Til 8:<br>Samtykt var, at Trivnaðarnevndin tekur sær av málinum. |

| | |
|---|---|
| **Mál 9:**<br>**Tilboð frá SH-Bygg uppá klæðing av Sam-býlinum.** | Til 9:<br>Samtykt varð at taka av tilboðnum uppá kr. 241.393,00 uttan MVG, treytað av, at arbeiðið byrjar beinanveg og verður gjørt liðugt. |
| **Mál 10:**<br>**Umsókn um byggiloyvi til terrassu á matr. nr. 457, Sandvík.** | Til 10:<br>Samtykt varð at geva byggiloyvi sambært givnum upplýsingum. |
| **Mál 11:**<br>**Umsókn um byggiloyvi til skúr á matr. nr. 31 í Hvalba.** | Til 11:<br>Samtykt varð at geva byggiloyvi, treytað av, at eigaraviðuskiftini eru í lagi og at Tekniska nevnd kemur á staðið, áðrenn bygt verður. |
| **Mál 12:**<br>**Tilboð viðv. kunning / upplýsing um Hvalbiar Kommunu.** | Til 12:<br>Samtykt varð ikki at taka av tilboðnum, tá kommunan hevur sína egnu heimasíðu. |
| **Mál 13:**<br>**Ársroknskapur fyri 2011 til góðkenningar.** | Til 13:<br>Raksturin javnvigaði við t.kr. 18.186 og fíggjar-støðan við t.kr. 4.761. Roknskapurin gav eitt hall á t.kr. 2.848. Roknskapurin varð einmælt samtyktur. |